Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hervør Pálsdóttir, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Listalig miðstøð

Spurningar:

1. Hvørjar ætlanir eru við gamla studentaskúlanum í Hoydølum?
2. Er ætlanin at gera gamla studentaskúlan í Hoydølum til eina listaliga miðstøð?
3. Um nei, hvørjar møguleikar sær landsstýrismaðurin fyri sær fyri at fáa eina listaliga miðstøð?

Viðmerkingar:
Í rúma tíð hevur verið tosað um, hvat gamli studentaskúlabygningurin í Hoydølum skal brúkast til, nú skúlin er fluttur í glæsiliga Glasir. LISA hevur verið úti við uppskoti um at gera eina listaliga miðstøð og umhvørvi, har listin í Føroyum kann blóma enn meira. Í uppskotinum varð víst á møguleikar við at framleiða list, at sýna list, at skapa altjóða netverk og alt møguligt annað. Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at frætta, hvørjar ætlanirnar eru við gamla studentaskúlanum og fyri at frætta, um tað verður arbeitt við at skapa eina listaliga miðstøð – t.d. í Hoydølum, so okkara listafólk og føroysk list fær betri umstøður at útfolda seg.

Á Løgtingi, 18. februar 2022

Hervør Pálsdóttir